# Samfelagsstevnan á Skálafjørðinum

**Um páskirnar skipaði Brøðrasamkoman fyri stórari samfelagsstevnu í høllini í Runavík, har m.a. ymiskt virksemi hjá samkomunum varð sýnt fram á básum**

SAMFELAGSSTEVNA
*Stefan í Skorini*



*Brøðrasamkomurnar við Skálafjørðin skipaðu um páskirnar fyri samfelagsstevnu í ítróttarhøllini í Runavík. Nógv fólk leitaði sær á møti at lýða á og at syngja við*

Nógv fólk hevur um páskirnar leitað sær inn á samfelagsstevnuna á Skálafjørðinum, sum samkomurnar Nerija á Skála, Elim í Søldarfirði, Berøa í Runavík og Nebo á Toftum skipaðu fyri.

Stevnan byrjaði við einum evangeliskum fundi á Skála, meðan hinir fundirnar vóru í ítróttarhøllini í Runavík. Vanliga vóru tveir fundir um dagin, meðan um kvøldið varð skipað fyri ungdómsmøtum, sangløtum og kvøldsetum í Berøa í Runavík.

Til hetta høvið var ein nýggj útgáva av sangbókini Lova Harranum prentað. Bókin hevur 287 sangir og kór við upplýsingum um sangskrivara og tónasmið.

Á samfelagsstevnuni var nógvur sangur umframt talurnar. Siloakórið úr Fuglafirði, Sangkórið úr Ebenezer, Sangkórið úr Nebo og barnakórið úr Berøa í Runavík settu sín dám á møtini.

Fleiri fólk, sum taka lut í ella hava tikið lut í trúboðanarverki, greiddu á fleiri av fundunum frá teirra virksemi og upplivingum í hesum verki.

Í høllini vóru settir upp eini tjúgu básar, sum á ymsan hátt sýndu virksemi hjá samkomunum. Framsýningarnar vóru opnar undan og eftir fundirnar. Tað vóru stovnar og samfeløg, sum eru í trúboðanarverki, ið skipaðu fyri framsýningunum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi. Skýggjað og okkurt kavaælið og hitin eitt vet oman fyri frostmarkið. Um náttina fýskar hann vindin av útsynningi og suðri. Skýggjað við vátakavaella regnælingi. Hitin umleið 2 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann frískar vindin upp í stívt andøvsgul av vestri og lækkar niður í útsynning ella sunnan og veksur upp í ein strúk. Regn, men út á dagin slítur í, men móti náttini aftur regn vestaneftir. Hitin økist til millum 5 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi, kanska upp í skrið lágt við regni. Móti náttini andøvsgul av útsynningi við ælaveðri. Hitin millum 6 og 8 stig, um náttina 3 til 5 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk, at byrja við av landsynningi, seinni av eystri. Skýggjað og regn ella ælaveður. Hitin umleið 4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Millum eitt lágtrýst yvir Suðurskandinaviu og eitt hátrýst yvir havinum sunnan fyri Ísland rekur køld luft inn yvir Føroyar av norði.




Hósdagin og fríggjadagin nærkast lágtrýst havinum í ein útsynning úr Íslandi. Brúgvaløg við regni og lýggjari luft fara komandi dagarnar fram við Føroyum av útsynningi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 10 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 19 |
| Malta | 21 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 23 |
| New York | 8 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

## HITALAGIÐ




Hitalagið márt frá 17/04 kl. 06[00]–18/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 0,3°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – márt frá 17/04 kl. 06[00]–18/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 71,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. apríl: Seinna kvarter
17. apríl: Mánin longst frá jørðini
23. apríl: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. apr | 04.45 | 17.04 | 03.45 | 16.04 | 04.00 | 16.19 | 06.45 | 19.04 | 07.45 | 20.04 | 03.00 | 15.19 | 02.00 | 14.19 | 05.00 | 17.19 | 06.00 | 18.19 | 04.30 | 16.49 | 05.45 | 18.04 |
| 20. apr | 05.23 | 17.42 | 04.23 | 16.42 | 04.38 | 16.57 | 07.23 | 19.42 | 08.23 | 20.42 | 03.38 | 15.57 | 02.38 | 14.57 | 05.38 | 17.57 | 06.38 | 18.57 | 05.08 | 17.27 | 06.23 | 18.42 |
| 21. apr | 06.01 | 18.20 | 05.01 | 17.20 | 05.16 | 17.35 | 08.01 | 20.20 | 09.01 | 21.20 | 04.16 | 16.35 | 03.16 | 15.35 | 06.16 | 18.35 | 07.16 | 19.35 | 05.46 | 18.05 | 07.01 | 19.20 |
| 22. apr | 06.39 | 18.59 | 05.39 | 17.59 | 05.54 | 18.14 | 08.39 | 20.59 | 09.39 | 21.59 | 04.54 | 17.14 | 03.54 | 16.14 | 06.54 | 19.14 | 07.54 | 20.14 | 06.24 | 18.44 | 07.39 | 19.59 |








Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 • Havn
Tlf. 319544

BILLUTIR

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666